FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Mannagongd fyri val av lesandi í stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya**

Samsvarandi § 9 í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya verður boðað frá, at mannagongdin fyri vali av lesandi sum umboð í stýrið verður henda:

1. Lesandi verða vald fyri 1 ár. Einaferð um árið verður skipað fyri vali av lesandi. Valið verður skipað við lestrarársbyrjan og í seinasta lagi 15. oktober.

2. Øll fulltíðarlesandi á Setrinum hava rætt til at velja eitt umboð í stýrið og eitt varaumboð.

3. Øll fulltíðarlesandi, sum eru innskrivað við Setrið tann fyrsta í mánaðinum, sum valið fer fram, hava valrætt og eru valbær.

4. Ein valnevnd, mannað við fyrisitingarstjóra, lestrarskrivstovuumboði og umboði fyri Ráð teirra lesandi, skipar valið eftir hesum leisti:
    a. Rektarin ásetir valdagin eftir tilmæli frá valnevndini
    b. Valnevndin tryggjar, at øll lesandi verða kunnað um møguleikan at stilla upp
    c. Tey, ið ynskja at stilla upp til val, lata valnevndini váttan um uppstilling í seinasta lagi 2 vikur áðrenn valdagin.
    d. Valnevndin góðkennir vallistan og kunnger hann á heimasíðu Setursins, og á sjónligum staði á deildum Setursins
    e. Valið verður skipað elektroniskt
    f. Valnevndin tryggjar, at øll valbær lesandi fáa møguleika at velja
    g. Lesandi hava bert loyvi til at seta kross við eitt valevni á listanum
    h. Valnevndin telur atkvøðurnar upp og kunnger valúrslitið. Valúrslitið verður kunngjørt seinast 3 yrkadagar eftir, at valið er avgreitt

5. Tann fyrst valdi verður stýrislimur og næst valdi varastýrislimur. Missur stýrislimur sítt valbæri í árinum, verður varastýrislimurin stýrislimur og 3. valdi stýrislimur verður varastýrislimur.

6. Ein og hvør valførur persónur kann kæra um hildið val. Kæran skal, innan 3 yrkadagar eftir at úrslitið er kunngjørt, verða latin valnevndini skrivliga. Valnevndin tekur saman við rektara støðu til kæruna innan 1 viku. Avgerð teirra er endalig.

Oktober 2016
Stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya